# BØNARLØTAN

Januar 2017 32. árg.

## Gott nýggjár!

**Eg rópi til Gud, hin hægsta, til tann Gud, sum fullførir verk Sítt fyri meg.** ***Sálmur 57.3***

## *1. Sunnudagur* *Lukas 4.1-21*



*Marjun og børnini*



*Føroysk hjálparfólk og børnini*



*Mikisok – glaður fyri leguna*

## GRØNLAND, Qaqortoq, Marjun og Páll Poulsen

„Vit kunnu ikki gevast í Grønlandi, tí sambandið við fólkið gjøgnum legurnar og sjúkrahúsið krevur, at vit halda á í hirðatænastuni. Men so er neyðugt, at vit fáa hjálp bæði til tímiligu og andaligu tænastuna“. sendibodid@gmail.com

**Nýggjársmøti á Signabø**

Fríggjakv. 6. jan. kl. 20, leygarkv. 7. jan. kl. 20 og sunnukv. 8. jan. kl. 19 eru møti í verkstaðnum Bulur á Signabø. Luttakarar m.o. Poul Færø, Jákup N. Olsen, Eyðfinn Reyðberg, Manskórið, John Færø, Jógvan á Lakjuni og Páll á Lakjuni.

**KRINGVARPIÐ**

| | | |
|---|---|---|
| 8. | jan. | Sjónvarpsmøti, Nazaret, Kaldbak |
| 8. | jan. | Sjónvarpsandakt, Jóhan við Neyst |
| 15. | jan. | Sjónvarpsandakt, Jóhan við Neyst |
| 5. | febr. | Útvarpsmøti, Elim, Søldarfjørður |

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

**Føroysk møtir í Jútlandi**

14. jan. kl. 19 í Esbjerg, Ådalsparken 33
15. jan. kl. 17 í Vejle, Frelsunarherhølið, Staldgårdsgade 4.
Gerhard Hansen og Fríðtór Debes vitja.

**Nýggj heimasíða – orðið.fo**

Orðið.fo er heimasíðutænasta undir Evangelisku Røddini. Dentur verður lagdur á videoupptøkur við bíbliundirvísing samkomum og einstaklingum til uppbygging.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *2. Mánadagur* — *3. Mós. 1.1-17*







### FØROYAR
### Birgit og Svenning av Lofti

4. jan. talar Svenning í Siloa í Fuglafirði um evnið „Ein nýggj byrjan“. 20. - 27. jan. luttekur Svenning á altjóða kristnari leiðarastevnu í Jerusalem, sum serstakliga viðger andaligu støðuna í Miðeystri í profetiskum ljósi. Biðið um varðveitslu á ferðini. 25. - 26. febr. skipar Svenning fyri evangeliskum fundum í hølunum hjá Dansifrøi í Havn. Biðið um vísdóm og andaliga vegleiðing at fyrireika hetta serstaka evangeliska tiltak.

**– Lis og Zacharias Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**

## *3. Týsdagur* — *Lukas 4.22-44*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Eg fari úr Føroyum aftur til Senegal 5. jan. Biðið, at ferðin gongur væl. Nógv er at orna í Dakar, áðrenn eg fari inn í landið til Tongia. Eg skal m.a. hava nýggjar akkumulatorar til sólorkuskipanina í húsinum hjá mær. Tað kann vera torført at finna nakrar, sum eru dygdargóðir. Biðið, at Harrin hjálpir mær við hesum. Eg vil helst sleppa frá at bíleggja teir úr USA.

## *4. Mikudagur* *3. Mós. 2.1-16*



**MEKSIKO, Michoacán, Purándiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 12, Victoria, 10,**
**Emma Grace 8, Jónatan 7,**
**Marcus 4, Evita Linda 1**

Haldið á at biðja fyri Berealeguni. Vit eru nú í Texas og fara aftur til Purándiro, so skjótt vit hava fingið váttanir og pass til barn okkara, sum vit vænta 10. jan.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 9, Svend 8, Terji 4, Petra 2**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *5. Hósdagur* *Sálmur 62*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 15, Ryan 7**

Allan flýgur aftur til Dakar 8. jan. Biðið fyri honum og okkum, nú hann er burturstaddur í útbúgving. Fleiri vinnulig námsfeløg eru komin higar at arbeiða tætt hjá okkum. Vit vita ikki, hvussu tað fer at ávirka økið og okkara tænastu. Okkum tørvar vísdóm og leiðslu Harrans.

## *6. Fríggjadagur* *Lukas 5.1-20*



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 9, Andreas 7, Kristina 5**

Fríggjakvøldssamkomurnar byrja aftur 13. jan. Møtini sunnudag kl. 11 halda á.



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**



**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Hannah 17, Eva 16,**
**Miriam Joy 13, Noah 10**

## *7. Leygardagur* *3. Mós. 3.1-17*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Í jan. búgvi eg meg til túrin til Filipsoyggjar. Vit rokna vanliga við, at tað tekur líka nógva tíð at fyrireika seg, sum tað tekur at gera arbeiðið, man skal, meðan man er har.



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**Jonathan Daniel 16 Ísak 14**

## 8. Sunnudagur — Lukas 5.21-39



**DANMARK, Brejning**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit eru heima allan jan., men ferðast samstundis at vitja og gera sjónbanda-upptøkur.

⋆ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 13 ár.

## 9. Mánadagur — 3. Mós. 4.1-19

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Joy 14, Adonia 8**

Adonia hevur tað strævið heilsuliga. Einir 60 ungdómar komu til trúarverjuátakið í nov. Næsta tiltakið verður nú í jan. Eitt skeið í trúarverju fyri tilkomin verður í Lonini, Lívdin, Oman Hoydalar 28, í jan. - feb. Hetta eru 8 kvøld við undirvísing. Tilmelding á www.livdin.fo ella tel. 597776.

## 10. Týsdagur — Lukas 6.1-19



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 14, Megan 12,**
**Trisha 4, Emma 0**

Okkara størsta ynski og bøn fyri 2017 er, at Harrin gevur okkum menniskju, sum veruliga søkja Hann, ikki bara signingarnar, sum Hann kann geva teimum.

## *11. Mikudagur* *3. Mós. 4.20-35*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Í jan. skifta vit vindeygu í salinum. Hetta er harðliga tiltrongd umvæling og bert ein av fleiri, sum gerast skulu, tí húsið er gamalt.

## *12. Hósdagur* *Sálmur 63*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**
Við atliti at kanningini hjá okkum metir leiðslan í NTM, at tríggjar familjur eiga at arbeiða saman í nýggja ættarbólkinum. Tann triðja familjan kemur higar í jan., men skal fyrst í minst seks mánaðir seta seg inn í málið og mentanina, áðrenn vit kunnu fara út í ættarbólkin. Ímeðan hjálpa vit til í einum fongsli at bera monnum gleðiboðskapin. Eisini hava vit møguleika at undirvísa í kristnari trúarlæru á einum tekniskum skúla.

## *13. Fríggjadagur* *Lukas 6.20-35*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Jonna og Hans Sivertsen**
Vit ætla at hava bíbliuskeið í heimunum henda veturin. Ulla og Jacob Tindalíð saman við Ragnhild, Elin og Jonhard hava barnamøti týsdag.

**GRØNLAND Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *14. Leygardagur* *3. Mós. 5.1.26*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
„Eg tali í samkomu í Georgia 22. jan. Dan og Christy við 6 av børnunum fara til Teilands 16. jan. at tæna Harranum í Asia. Sára, 19 ár, fer fyrst at hjálpa teimum at flyta, síðan heldur hon á at arbeiða á barnaheiminum í Chiang Mai. Nú fyrireika vit okkum eisini at vera á Filipsoyggjum allan febr. og mars". Óli hevur fingið krabbamein í høgra kjálka, sum hann skjótt skal fáa viðgerð fyri hjá húðlækna.



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 15**

## *15. Sunnudagur* *Lukas 6.36-49*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**
3. - 5. febr. verður mansvikuskifti á Malta. Einar Vang og Hans Joensen úr Havn og Svein í Prestgarði úr Hvalba luttaka.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 9**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech, Jan 14**

## *16. Mánadagur* *3. Mós. 6.1-23*

**MEKSIKO,**
**Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Markusar Ev. á fyrsta økismálinum varð givið út í 2001. Nú umseta vit Markus Ev. til enn eitt økismál. Annað stig er, at ráðgevi eftirkannar umsetingina. Síðan lesa vit hana fyri fólki í bygdunum at kanna, um tey skilja tekstin. At enda verður teksturin settur upp til prentingar.



*Boðskapurin er greiðari at lesa á egnum máli.*

## *17. Týsdagur* *Lukas 7.1-23*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit eru fegin um, at Augustin av saafi-uppruna tann 17. nov. undirvísti í Bíbliuni í nærvarpinum á saafi-máli. Sendingarnar verða væl móttiknar. Vit ætla eisini at gera tær tøkar á alnótini, so meiri múgvandi saafi-fólk, ið hava netsamband, kunnu lurta. Eisini gera vit minniskort til fartelefonir. Nýggi heilsurøktarin hjá Annu er framúr og tekur sær eisini av henni, meðan Dubby fer til Senegal í febr. Charlton klárar seg væl í nýggja starvinum innan telduforriting.

## *18. Mikudagur* *3. Mós. 7.1-19*



**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 3 , Micah 3**

Í nov. byrjaðu vit Alpha-skeið fyri fólki, ið hava hug at vita meir um kristnu trúnna. Tey ungu í samkomuni skipa fyri, og Solomon hjálpir teimum. Vit uppliva vakstrartíð í samkomuni og gleðast um at síggja Andan virka her. Takk fyri stuðul tykkara í bønini.

## *19. Hósdagur* *Sálmur 64*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Arbeiðið við bíbliubrævskeiðnum gongur væl. Vit fáa umleið 220 nýggjar fyrispurningar hvørja viku um at fáa Nýggja Testamenti og annan lesnað. Talið á teimum, sum senda spurnarblaðið aftur, er eisini vaksandi, og talið á teimum, sum ringja inn og verða leidd til umvending um telefonina, økist áhaldandi. Biðið, tí støðan í Turkalandi gerst alsamt spentari, og stjórnin ætlar at herða stýrisskipanina. Minnist tey, sum hava mist síni kæru seinastu mánaðirnar av bumbum og øðrum hóttanum, og biðið, at alsamt fleiri leita til Harran – markirnar eru hvítar til at heysta. Jóh 4,35.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 8, Noah 7, Karis 3, Judah 1**

## *20. Fríggjadagur* *1. Kor. 10.15-11.1*



**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 5**

Biðið fyri Winu, sum hevur trupulleikar við rygginum og skal ansa væl eftir, hvat hon ger. Nógv er at gera á skrivstovuni.

## *21. Leygardagur* *Esaias 21.1-17*

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 6, Leah Eve 3**

Minnist ungdómsarbeiðið, samkomuna og aðrar tænastur, vit hava. Jóhannis byrjar í nýggjum starvi hendan mánaðin og skal laga seg til nýggjar umstøður.

## *22. Sunnudagur* *1. Kor. 11.2-16*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 10, Rebekah 8, Lydia 6**

14. nov. var nýggja og fullfíggjaða sorani kurdiska bíblian endiliga tøk á vælumtóktu appini YouVersion. Eg havi hjálpt fýra fólkum at taka hana niður, tveimum trúgvandi og tveimum, sum enn ikki játta trúgv.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 13**

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *23. Mánadagur* *Esaias 22.1-25*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 13, Rebekka 11, Hanna 8**

Tim ferðast nógv til Naplud. Fyri nøkrum døgum síðan, meðan hann var í Naplud, fekk hann boð frá leiðsluni í NTM um at skunda sær úr bygdini, tí víðgongdir muslimar vóru nærhendis. Biðið um vísdóm, varðveitslu og skynsemi at vita, nær ráðiligt er at vera í Naplud, og nær best er at halda seg burtur.

## *24. Týsdagur* *1. Kor. 11.17-34*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 12, Micah 9, Ezra 8**
**Uhenya 5, Boas 3**

Vit gleðast um, at 160 ung og 120 børn komu á legu í des. Vit eru sera takksom, at tað gjørdist møguligt at keypa ein lítlan buss, sum ger tað tryggari hjá okkum at ferðast aftur og fram.

## *25. Mikudagur* *Esaias 23.1-18*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

At vita at trúgvandi í Føroyum biðja regluliga fyri okkum og fyri arbeiðnum, vit gera í Calvary Church, gleðir okkum stórliga!

## *26. Hósdagur* *Sálmur 65*



**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 12, James 10, Micah 6**

Vit takka fyri bønarsvar, tí Micah, sum hevur astma, hevur tað nú heilt gott aftur eftir kanning og viðgerð. GoodSeed heldur fyrilestrar 27. - 30. jan. um at evangelisera. Biðið, at áhoyrararnir fáa hug at greiða øðrum frá gleðiboðskapinum.

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen**
**Steffan 17, Caleb 14**

## *27. Fríggjadagur* *1. Kor. 12.1-13*



**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Vit gleðast og eru takksom fyri fyrsta savnaða eintakið av Piaroa-bíbliuni, sum vit hava avgreitt her á prentmiðstøðini. 2000 eintøk eru prentað. Tey verða nú send inn í ættarbólkin, har brøður og systrar bíða eftir sínari fyrstu Bíbliu. Biðið, at hesar Bíbliur koma væl fram, nú tær verða fluttar í fleiri dagar niðan eftir ánni til allar tær fjartskotnu bygdirnar í regnskóginum.

**FILIPOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

⋆ Í dag fyllir Micah Lukama 10 ár.

## *28. Leygardagur* *Esaias 24.1-23*



**FILIPSOYGGJAR, Manila**
**Anja Nielsen**

Eg takki tykkum øllum, sum hava biðið fyri mær øll 10 árini, eg havi verið á Filipsoyggjum. Eg biði eisini fyri tykkum og komi skjótt at vitja. Minnist meg, nú eg fari á bíbliuskúla í apríl.



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

★ Í dag fyllir Adonia Johannesen 9 ár og Emma Grace Tuohy fyllir 9 ár.

## *29. Sunnudagur* *1. Kor. 12.14-31*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 11, Aron 4, Noah Kristian 3**

Ætlanin er, at Sørin kemur til Føroya at vitja samkomur. Setið tykkum í samband við hann á sorinjoensen@gmail.com at avtala, nær best er at vitja tína samkomu.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Jónvør Christiansen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## OM FØROYAR

### Anita og Oddmar Tausen

Durita Olsen úr Fuglafirði fer til Kili 1. febr. í 9 mánaðir. Fyrsta avbjóðingin er at læra spanskt og at liva í aðari mentan. Guðrið Larsen, sum er í parttíðarstarvi á OM-skrivstovuni her, fer til Týsklands á Go Stevnu hjá OM fyri at læra meir. Vit eru takksom fyri Guds trúfesti og øll tey, ið hava verið og enn eru úti at boða gleðiboðskapin.

⋆ Í dag fyllir Petra í Prestgarði 3 ár.

## MÍNI BØNAREVNI

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Telduposturur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31. Týsdagur* *1. Kor. 13.1-13*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**

**199 kr.**




Bókin er søgan um Nabeel Qureshi, sum er útbúgvin lækni og uppvaksin í ortodoksari, muslimskari familju. Nabeel var íðin muslimur, tá hann byrjaði á universitetinum. Hann lærdi Jesus at kenna sum frelsara gjøgnum trúgvandi vinmann. Nabeel er við í felagsskapinum hjá Ravi Zacharias, sum hevur til endamáls at røkka lesandi við boðskapinum um Kristus. Í aug. 2016 fekk Nabeel Qureshi staðfest krabbavøkstur í maganum, og útlitini eru døpur. Biðið fyri Nabeel.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos